# Suðuroyar Sparikassi nýggj og snotulig høli í miðbýnum

**Í gjáramorgunin læt Suðuroyar Sparikassi upp í nýggjum hølum í miðbýnum í Havn**

NÝGGJ HØLI
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Nýggja adressan hjá Suðuroyar Sparikassa í Havn er nú Niels Finsensgøta 31. Hetta er bygningurin beint yvir av bilstøðini Auto, har Mina Wilhelm áður hevði sína hattaforrætning.

Nýggju hølini hjá Suðuroyar Sparikassa eru ljós og nútímans. Tey eru sett í stand til endamálið í einum spennandi byggisniði.

### Betri umstøður

Nýggju hølini skapa betri umstøður fyri viðskiftafólkini, tá ið hesi vitja á deildini, eins og arbeiðsumstøðurnar hjá starvsfólkunum eisini eru betri.

– Hetta fegnast vit um, siga tey í Suðuroyar Sparikassa. Við nýggju hølunum verður deildin hjá Suðuroyar Sparikassa í miðbýnum meira sjónlig, samstundis sum bygningurin eisini setir sín dám á miðbýarumhvørvið í ovara partinum á gongugøtuni.

### Fimm starvsfólk

Hølini í Niels Finsensgøtu eru í trimum hæddum við kundaavgreiðslu beint inn frá gøtuni og kundaráðgeving í miðhæddini.

Á deildini hjá Suðuroyar Sparikassa í Havn arbeiða í dag 5 starvsfólk.



*Í Suðuroyar Sparikassa eru tey væl nøgd við nýggju hølini, fv. stjórin, Søren og Rúni, deildarleiðari í Havn*

Mynd: Jens Kr. Vang




*Bygningurin, har Suðuroyar Sparikassi nú húsast í ovara parti av miðbýnum, setir sín dám á miðbýarumhvørvið*

Mynd: Jens Kr. Vang

# Hans Petur selir sínar handlar

**Felagið Vársól, sum Hans Petur Ellingsgaard hevur átt í fleiri ár, er nú selt. Nýggir eigarar eru Kristian Súni (Bassi) Jensen og Hallur O. Gunnarsson**

SØLA/KEYP
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Sp/f Vársól v/ Hans Peturi Ellingsgaard hevur átt og rikið kioskirnar, Vár í Saltangará, Vár í Klaksvík og skógvahandilin, Pattino í Klaksvík.

Nú hava hesar kioskir og handlar fingið nýggjar eigarar, sum eru Kristian Súni (Bassi) Jensen og Hallur O. Gunnarsson.

Við í keypinum er ikki nýggi bygningurin, sum Hans Petur Ellingsgaard nýliga hevur bygt í Saltangará.

Tað er bara sjálvt handilsvirksemið, sum er selt – og keypt.

Kioskirnar og handilin halda fram í somu hølum sum higartil, bæði í Saltangará og í Klaksvík.

### Hans Petur og Paula

Vár í Saltangará varð sett á stovn fyri 22 árum síðan, og virksemið í Klaksvík byrjaði fyri fimm árum síðan.

Hans Petur Ellingsgaard hevur verið stjóri í felagnum øll árini, og seinastu nógvu árini hevur hann saman við konuni, Paulu Ellingsgaard, rikið virksemið.

### Móttøka

Í samband við, at nýggju eigararnir yvirtaka virksemið hjá Sp/f Vársól, verður móttøka í Klaksvík í dag frá klokkan 14-17 og í Saltangará í morgin, 5. apríl, frá klokkan 14-17.

Seljari og keyparar siga, at øll eru vælkomin til móttøkurnar.



*Seljarar og keyparar, fv. Hans Petur Ellingsggaard, Paula Ellingsgaard, Hallur Gunnarsson og Kristian (Bassi) Jensen*



*Við í keypinum hjá Bassa og Halli er ikki bygningurin hjá Hans Peturi Ellingsgaard í Saltangará, men Kiosk Vár kemur vera í somu hølum sum higartil*

Mynd: Vilmund Jacobsen